# HEILSANIR



**Góða, elskaða Marjun**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 17.3. Hopi tú fært ein góðan dag. Jesus veri hjá tær. Elski teg.
**Heilsan, babba**



**Góða Heidi**
Tær verður ynskt hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum tann 18. mars. Nú ert tú blivin ein stór genta. Eisini ynskja vit tær alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan, mamma, babba og Vanja**



**Hey, Oddvør**
Tillukku við 30 ára degnum í dag. Tolin trívst –so trola bara víðari.
**Heilsan, Anna & Petur**



**Góða Marjun**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 17.3. Alt tað besta í framtíðini. Elska teg.
**Heilsan, omma og abbi uppi í Geilini**



Hjartaliga tillukku.
**Heilsan, ein vinur**



**Góði, elskaði maður mín!**
Hjartaliga tillukku á 30 ára degnum 17. mars. Eg tapti og tú vann! Eingin piparbússa í túninum! Tíbetur! Eg elski teg.
**Kona tín**





**Góði, besti babba**
Tú ert best í allari verðini, eingin er so fittur og góður sum tú. Eg havi tað best við tær, tí tá sleppi eg alt. Hjartaliga tillukku á 30 ára degnum ynskir
**sonur tín Óðin**



**Góða mostir**
Hjartaliga tillukku við piparinum í dag, 16. mars.
**Heilsan, Brian & Eydna Maria**



**Góða Vár Naomi**
Tillukku við 8 ára degnum.
**Bestu heilsanir, mamma, babba, Høgni og lítli Hjalti**



**Góða mamma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 15. mars.
**Heilsan, Brian & Eydna Maria**



**Góði, fitti Janus**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum í dag ynskja vit øll,
**Ása**









**Hey, kjera, fitta Marianna**
Hjartaliga tillukku við 21 ára degnum. Vit vóna at tú fært ein super dag og at tú ert klár tá vit koma heim.
**Heilsan, venindurnar**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á middegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

## FØÐINGAR



Tann 6. mars bleiv Tóra stórasystur. Her situr hon við sínum nýfødda lítlabeiggja, sum var 56 cm. langur og vigaði 4250 gr. Foreldur teirra eru Elin Hentze í Stórustovu og René Dahl Olesen, Tórshavn

19. februar fingu Hallbera West og Sigmund av Teigum ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

20. februar fingu Anna Elisabeth Veihe og Niels Juul Stenberg, Porkeri, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2770 gr.

3. mars fingu Diana Dahl og Dan Djurhuus, Vágur, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3160 gr.

6. mars fingu Nicolina Johansen og Jógvan Ellefsen, Signabøur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

7. mars fingu Helma Jacobsen og Karl Dam, Leirvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2900 gr.

7. mars fingu Unn og Johannes Steingrund, Glyvrar, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

9. mars fingu Rannvá Hansen og Sigurd Vatnhamar, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4200 gr.

10. mars fingu Lydia og Kári Durhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3650 gr.

10. mars fingu Malan Simona og Thomas Dam, Nes, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2800 gr.

10. mars fingu Bjørg Akraberg Poulsen og Birni Durhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3230 gr.

11. mars fingu Sanna og Jacob Pauli Silvurstein, Hestur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4420 gr.

11. mars fingu Simona og Remi Kambskarð, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2730 gr.

12. mars fingu Jónhild Jacobsen og Ottar Hentze, Sandur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

12. mars fingu Una Matras og Johan Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3630 gr.

12. mars fingu Gunna Dimon og Jón við Neyst, Hvalba, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3400 gr.

## ANDLÁT

**07. mars**
Charlotte Gaard Olsen, dóttir Tage og Johonnu Olsen, ættað úr Oyndarfirði, búsitandi í Havnesø í Danmark, 36 ár.

**08. mars**
Elspa Maria Zachariassen, lærari, Kvívík, 60 ár.
Emma Morentsa Dagmar Danielsen, fødd Johansen, Keypmannahavn, 92 ár.

**09. mars**
Anna Hansen, fødd Persson, Havn, 66 ár.
Selma Johannesen, Toftir, 78 ár.
Elsebeth Stenberg, vanliga nevnd Elspa í Víkabyrgi, Sumba, 88 ár.
Haldur Sigurdson, Klaksvík, 81 ár.

**10. mars**
Jens Vestergaard, Akrar, 74 ár.

**11. mars**
Øssur Eysturoy, ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Keypmannahavn, 81 ár.
Lena Andreassen, Rituvík, 89 ár.

**12. mars**
Tove Mommer, Keypmannahavn, National leiðari í Aglow, 76 ár.

### Gudstænastur Boðanardagur Mariu:
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, konfirmatión, Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12, Heri Joensen
*Vágur:* kl. 11, M. Telling
*Kollafjørður:* kl. 12, Hans J. Joensen, biskupur
*Kvívík:* kl. 17, Emil Olsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Jørgen Anker Jørgensen og Meinhard Bjartalíð
*Glyvra kirkja:* kl.11, deyvagudst., altarg., Jónsvein Bech
*Rituvík:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Hvalvík:* kl. 12, Inga P. Dam
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Viðareiði:* kl. 12 (útvarpið) Elsa funding
*Sørvágur:* kl. 11, konfirmatión v/ David Johannesen
*Sandur:* kl. 12, Uni Næs
*Húsavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Elduvík:* kl. 12 altarg., Bjarni Bæk,
kl. 20.15 Meinhard Bjartalíð
*Funningsfjørður:* kl. 19, Meinhard Bjartalíð
*Hellurnar:* kl. 19, J. Fríðriksson

Í Glyvra kirkju gongur talvan sunnudagin fyri deyvameinigheitini.

### KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: Fundur við Duritu Tausen (bert fyri limir).
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman, við Emil Olsen presti. Evni: 1. Krýnikubók.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, Palli Petersen talar. Kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarmøti. Kl. 18 Møti, Elisabeth Joensen talar.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

### Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangel. fundur.

### Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

### Meinigheitin í Hoyvík
*Hoyvíkar skúli*
Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn. Á møtinum kl. 18 talar Jónfinn Olsen og Pól Hentze syngur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti á Brekku 3. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti v/ Kaj Eli Hansen av Toftum.
Mánakvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti, kl. 21 Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíðan:
www.ebenezer.fo

### Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 YM-møti við Hera Kjærbo.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

### Hvítusunnusamkoman
*Yviri við Strond*
Sunnudagin 17. mars kl. 11 Morgunmøti, Sanna og Vinjard frá YVAM greiða frá um bíbliuskúla sum verður í Føroyum í heyst. Einki møti kl. 18 vegna møti í Vestmanna.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti við luttakarum úr Alpha-skeiðnum.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti við Tórshavnar Hvítusunnusamkomu, øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

### Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Absalon Matras. Greitt verður frá arbeiðinum í Rumenien. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Filadelfia, Gøtugjógv
Familjumøti verður sunnukvøldið kl. 18 við luttøku av Argjum. Øll eru vælkomin.

### Gøta
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Jaspur Langgaard luttekur. Øll eru vælkomin.
Sunnukvøldið kl. 20: Konsert við Vestmanna sangkóri v/ Kára Bæk.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Øydis Olsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

### Elim, Søldarfjørður
Sunnudagin kl. 12 Breyðbróting og sunnudagsskúli. Kl. 18 greiðir Hans Arni Jensen, Leirvík frá missiónsvirki teirra í Afrika og vísir video.

### Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Liljurnar møta mánadagin kl. 17 og ungdómsbólkurin kl. 20. Øll eru vælkomin.

### Soli Deo Gloria
Leygardagin kl. 10 Bøn, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

### Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 16. mars kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

### Missiónshúsið, Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Lovsangur, kl. 18 Møti.
Týskvøldið kl. 20 bíbliutími.

### Aglow, Suðuroy
Møti verður leygardagin kl. 16 í Samvirkinum í Porkeri. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudags-skúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Vági.

### Bygdarhúsið í Lopra
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur
Fríggjadagin kl. 20 Soldátamøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti í »Fjallbrúður« major Knut Gamst talar.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Missiónshúsið í Vági
Missiónsvikan heldur fram fríggjakvøldið kl. 20 við Regin Høgnesen og øðrum, Mourits Viderø syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 við somu, Kórið úr Porkeri syngur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Regin Høgnesen og øðrum. Tey fýra syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

### Eldrafelagið Borgin
í Fuglafirði hevur hugnaløtu í Felagslonini týskvøldið 19. mars kl. 19.

### Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
**Kennir tú føroying í Keypmannahavn**, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við
*Reyða Kross Føroya,*
*Bryggjubakki 10,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 319630/61655400.*

### Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

### Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Gud náði meg syndara!*

*Luk. 18,13*

Fyri tollaranum var støðan vónleys –menniskjaliga sæð. Men hinvegin, fyri Gudi er einki ómøguligt. Tollarin sær sína sonnu støðu. Hann sá, at vit eru so stórir syndarar, at bara Gud sjálvur kann bjarga okkum! At síggja sína støðu er treyt fyri at hoyra hin kristna boðskapin sum ein gleðiboðskap.

Sannleikin er tann, at syndin er so stór, at vit einki megna í okkara frelsusøk. Jesus má doyggja á krossi. Bara henda offurgerð kann bjarga okkum. At síggja hetta er at ganga í seg sjálvan og síðan flýggja til krossins fót og til altarborðið. Har er fyrigeving, lív og sæla. Vit eru og verða syndarar so leingi, vit liva í hesum heimi. Ja, men náðaðir syndarar. Og tað ger munin. Guds náði í Jesusi Kristi. Har vit einki megna, har megnar Jesus. hann er okkara einasti bjargingarplanki.

At viðganga hetta er at síggja sína sonnu støðu – og tað er at trúgva. Og henda trúgv rættvísger teg fyri Gudi, Gud sær teg gjøgnum Jesus. Og tí hava vit, sum tað verður sagt, frímóð á dómadegi. Og nú er støðan ikki vónleys meir. Vit byggja á eina fremmanda rættvísi, trúarrættvísina. Gud rekur ikki ein angrandi syndara frá sær. Og tað merkir, at nú hava tú og eg ein møguleika til frelsu. Og møguleikin er trúgvin á Jesus, sum er bót fyri synd og skuld okkara. Síggj tína sonnu støðu, gev teg yvir og lít á tín frelsara!

Amen

**David Johannesen**